# Tað verður trupult at broyta fortíðina

HELGI ABRAHAMSEN
løgtingsmaður



**Viðmerking til Bergtóru Høgnadóttir Joensen**

Løgtingskvinnan Bergtóra Høgnadóttir Joensen, hevði eina grein í Dimmalætting fríggjadagin, sum hon kallaði "Góða mamma, tað var ikki eg". Í greinini harmast hon um, at sambandsfólk hava hug at geva Tjóðveldinum skyldina fyri tær fylgjurnar, sum blokkniðurskurðurin hevur havt fyri samfelagið.

Bergtóra sigur, at bruttotjóðarúrtøkan er vaksin við meira enn trimum milliardum, síðani blokkstuðulin lækkaði, og hetta, heldur hon, skuldi vigað væl uppímóti mistu inntøkuni. Men ger tað nú tað?

**Bruttotjóðarúrtøka og blokkstuðul er hvør sítt**

Bruttotjóðarúrtøkan sigur, hvussu nógv tað føroyska samfelagið (bæði alment og privat) framleiðir fyri, men hon sigur einki um tað bygnaðarliga hallið hjá landskassanum. Og her liggur sjálvur trupulleikin. Føroyski búskapurin hevur tað sum heild gott, men landskassin hevur eitt stórt bygnaðarligt hall, sum er umleið líka stórt sum blokkniðurskurðurin.

Sjálvandi smittar ein búskaparvøkstur fyrr ella seinni yvir á landskassan, men hann kann ikki samanberast við tað, sum stendur beinleiðis á inntøkusíðuni í landskassaroknskapinum (her hugsi eg um blokkin).

**Mangt er broytt síðani Hvítubók**

Sigast má, at mangt er broytt hesi 10 árini, síðani tann navnframa Hvítabók kom á marknaðin. Tá fingu vit at vita frá Tjóðveldisflokkinum, at um bruttotjóðarúrtøkan bara vaks 2 prosent um árið, so kundu vit taka allan blokkstuðulin burtur eftir fáum árum, uttan at tað fór at kosta í vælferð. Men nú hava hesi somu fólkini úr at gera við at greiða frá, hví tað kortini ikki gekk soleiðis, sum tey søgdu.

Vit fáa at vita frá Bergtóru, at bruttotjóðarúrtøkan er vaksin nógv meira enn 2 prosent um árið, og kortini hongur fíggjarlógin als ikki saman. Men hon kemur sjálv við eini frágreiðing. Hon sigur, at tað er tí at ABC-samgongan gav skattalættar fyri 400 mió. krónur árliga, og tað eru hesar 400 milliónirnar, sum nú mangla í.

Talið 400 mió. er skeivt, og harafturat er tað løgið, at hon bara nevnir skattalættarnar hjá ABC-samgonguni, og ikki skattalættarnar hjá fullveldissamgonguni og sjálvstýrissamgonguni, - men sig mær eitt: Veit Bergtóra ikki av, at tað eru meira enn 600 mió. krónur eftir av blokkstuðlinum? (hann skuldi jú allur burtur, uttan at tað fór at kosta í vælferð). 600 mió. í meirinntøku er nógv meira enn 400 mió. í mistari inntøku.

Kann Bergtóra siga mær, hví veruleikin bleiv so nógv øðrvísi enn tað, sum Hvítabók lovaði okkum?

Og kann hon eisini greiða frá, hvussu hon fær 60 mió. krónur í skattalætta um árið í 4 ár, at blíva til 400 mió. krónur tilsamans? 60 ferðir 4 var ikki 400 tá eg gekk í skúla.

**Eingir pengar at spara upp**

Bergtóra endurgevur í greinini ein fíggjarmálaráðharra hjá Sambandsflokkinum, sum aftur og aftur segði, at føroyski búskapurin var yvirhitaður, og at ov nógvur peningur var sendur út í samfelagið frá tí almenna, og hetta tekur hon sum okkurt slag av prógvi um, at pengar manglaðu ikki.

Eg ivist í, um endurgevingin er heilt røtt, men hugsanin aftanfyri er, at tá nógv ferð er á búskapinum, skulu vit halda aftur við almennu útreiðslunum og goyma pengarnar til verri tíðir. Men trupulleikin síðani blokkniðurskurðin hevur alla tíðina verið, at sjálvt í góðum tíðum hava vit ikki átt nóg mikið til at spara upp til verri tíðir, og tí fáa vit ein trupulleika. Trupulleikin er ikki at vit áttu ov nógvar pengar í teimum góðu tíðunum, men at vit ikki megnaðu at spara upp til verri tíðir. Í ringum tíðum er undirskotið risa stórt.

**Sosiali radarin hjá CHE**

Bergtóra viðgerð síðani sparingarnar, sum sitandi samgonga hevur framt á almannaøkinum, og har eri eg ikki ósamdur við øllum, sum hon sigur. Men hyggja vit eftir heildini, so hevur henda samgongan játtað fleiri pengar til almannamál, enn CHE-samgongan, sum Bergtóra var partur av, játtaði til hetta økið. Eisini tá vit hyggja eftir almannamálum sum prosentparti av samlaðu fíggjarlógini, liggur henda samgongan frammanfyri CHE, so tað er ikki høvuðsraðfestingin í sær sjálvum, sum galið er við, - men pengar mangla, og eg veit hví!

Tjóðveldi kann ikki ganga og billa fólki inn, at talið av krónum, sum fer niður í landskassan, onga ávirkan hevur á, hvussu nógv kann takast úr kassanum aftur.

**Fortíðin broytist ikki**

Sjálvandi er tað keðiligt, at sambandsfólk skulu vera so forherðað, at tey geva Tjóðveldinum skyldina fyri blokkniðurskurðin, og alt tað sum honum fylgir á baki. Men veruleikanum kann man nú einaferð ikki renna undan.

# Í móttøkuhøli býarins og býurin

ARNSTEIN NICLASEN



Heðin Mortensen hevði aftur í ár – og við blíðari manning - boðið teim fyrrverandi og teim verandi býráðslimum í Móttøkuhúsið við Tróndargøtu til eina hugnaløtu (9/10). Og hugfarsligt varð vituliga at hitta bæði nýggjar limir og teir »gomlu gubbarnar og vestalinnurnar« aftur - og at heilsa upp á fyrrverandi og núverandi leiðslu býarsins.

Sum tíðin fer, so sáldar minnið skuggaløturnar burturfrá. Og ein gleðist meir og meir, í sínum stilla sinni, yvir tey hissini framtøk, sum tá í løtuni – ikki tyktust at vera so nógv verd í dagsins meldri – í mun til onnur tyngri tøk og átroðkandi mál í kvøldannar seiga og seina tíma.

Mong munandi framtøk, ið komu, sum: ringvegurin, nóg mikið av og reinsað drekkivatn úr Villingadali, havnarvíðkanin, svimjihøllin o.s.fr.

**Men so hini:**

Sandstrondin í Sandágerði kennist bæði frálík og fjálg, ár um ár, síðani hon í 1980'unum vendi kærkomin aftur til Sandáarósan - serliga hjá spælandi børnum og mammum teirra í summarsins sól. Og sandurin har úti er bæði víðari og betri nú, enn hann var, táið hann varð tikin burtur og hvarv, sum ífylla til betong í sambandi við hospitalið í 1922. Og restin fór seinni til líknandi endamál.

Hóskandi húsanøvn eru komin aftur á flestu húsini úti á Reyni: Skrivarastova, Dalólastova, Mettustova, í Tranti, Boyggjastova, í ovara og niðara Kina o.s.fr. Og hetta er at gleðast um, soleiðis at hesin rákin ikki bara hvørvur úr lokalsøgu høvuðsstaðarins, sum ein hugbirtandi søguligur og tekkiligur »húsroykur« tó hongur uppi í.

Meistaraverkið – bæði í dygd, stødd og teksti – bókin: »Tann deiliga Havn« eftir Villiam Heinesen/ John Davidsen við framúrskarandi tekningum av Ingálvi av Reyni kom tá útaftur. Ein fragd fyri øll at dvølja við - ella bara at blaða í.

**Klokkutornið**

Í Havnar kirkju spælir síni sorgblídnu løg fyri ung og eldri: - at dagurin hallar og at stóra fossinum dregur - og hetta fyri pengar frá gamla »Nótafelagnum« (sum als ikki hevði nakað við musikk at gera, men við horvnan veiðireiðskap frá gamlari tíð). Peningurin fór til at skifta niðurslitna mekaniska klokkuverkið út við nútíðar tøku og teknisku hentleikar.

Listaskálin slapp virðiliga at vaksa inn í Plantasjuna eftir makaleysa sorlið - av ódnunum um árskiftið í 1988/89.

Ótýddliga økið á Glaðsheyggi við sandi, hyljum og kolarestum er vorðið eitt nossligt parkeringspláss við standmyndum og útsýni (økið er langtíðarleigað frá landinum).

Og gøturnar fram við ánni í Hoydølum verða nú væl vitjaðar í sambandi við tey tilráddu rørslu-heilsuátøkini til bata fyri likam og sál (ja, lat tað verða sagt her, at ein kennir ogn í býargartnaranum Tóra í Hoyvík (í Kvívík?), sum við léttari hond í tekning og teksti - og ikki minst við hepnum handalagi - fekk tey hálvvaksnu arbeiðsleysu undir »kreppuni« í 1990'unum at fáa avrikað hetta gøtukervið undir Svartafossi. Hetta bæði við hegni og humori (sum Tórur ikki hevur frá fremmandum. Og so er tað sagt eisini -.)

Bátahavnin undir Skálatrøð og sermerkta umhvørvið í Vágsbotni – sum nú er komið enn longur á leið við Müllers pakkhúsi seinni o.m.a.

Men, merkiligt er tað tó, sum Skansin (sum eitt forfjónað barn) verður gloymdur – eitt nú bara við litaðum perum á Ólavsøku. Skansin sum tó er eitt symbol – hóast ikki so vinnandi – um Magnus Heinason í uml. 1585 og onnur seinni, sum tó høvdu ein dreym um, ja: »We Shall Overcome …«(!) Ella nakað sovorðið.

**Men var hetta nakað?**

Og eitt hjartasuff - ella kanska eitt heldur krímsett hugarensl - at enda: man tíðin vera farin frá tí einsama og trónandi »Kongaminninum«, og man tað vera nakar, sum vitjar hetta løgna fyribrigdi?

Og kennist eisini nøkur serstøk ogn í storknaðu standmyndini av »norska sjómanninum« í Plantasjuni, nú ið vit eiga so evnaríkar myndhøggarar í landinum?

Reykjavík hevur sínar »Kjarvalstaðir«, sum, bæði høg og lág, fremmand og heimlig, kunnu og eiga at at vitja, og har kunnu fáa sær ein bita og gleðast yvir tað besta av landsins heila-, handa- og hugakynstri.

Hvat nú um vit – eitt nú har á einum av hesum støðunum ella aðrastaðni á býnum – gjørdu einar »Ingálvsstaðir« og/ella »Williamsstaðir«, hesir báðir – sum við samdari samtykt í býráðnum - vórðu tilnevndir heiðurslimir býarins. Hóast tann fyrrnevndi - sær sjálvum so líkur - bar seg »strangliga« (!) undan hesum bæriliga heiðuri -. Og hetta bleiv honum eftirlíkað. (Ingálvur, Ingálvur, Havnin verður ikki aftur tann sama, eftir at hann er farin - .)

Og á hesum staði kundi so funnist tað besta av føroyskum kunsti: myndir gjøgnum tíðina frá Mikinesi, Ingálvi og øllum hinum góðu. Eisini standmyndir, ja - og hví ikki - tær bestu tekningarnar eftir eitt nú Ingálv, William og Óla P. eisini?

Tað kundi verðið ein landsogn, sum bar av øllum, bæði tiltrongd og til gleði fyri alt fólkið í dagsins og lívsins andróðri.

## Sjálvmálið veruleiki?

PÁLL Á REYNATÚGVU



Tað gleðir meg at onkur av vanligu borgarunum í landinum framvegis stríðist móti sníkjandi donsku málimperialismuni. Eg vóni til tað síðsta, at floksins kosnu síggja álvaran í hesum, fyri tjóðina, sera týdningarmikla máli. Annars er tað alt rós vert, tað sjálvbodna arbeiðið, sum málrøktararnir Árni Dahl og Eyðun á Borg verja tjóðina við hvønn guds skapta dag.

Vit eiga helst øll persónligar søgur at byggja á, sum Árni Dahl so væl lýsir í síni seinastu almennu viðmerking. Kann leggja afturat, at pápi mín varð doyptur Niels av einum donskum presti. Einki forðaði tó okkum í at kalla hann upp, tá sonur okkara varð doyptur Nils, við aðrari stavseting.

Tað er eisini komið mær fyri oyra, at málsligu alnótsásetingarnar verða víðkaðar í komandi tíðum, so fleiri upprunamálsstavir eisini kunnu nýtast á eitt nú heimasíðum, fyri at tryggja at »internationaliseringin« ikki fer avstað við ymsu upprunamálunum. Júst tí tykist tað uppaftur løgnari, at vit nú so glaðbeint skulu kíka øllum tí, sum danskt er.

Og uppaftur meira harmiligt, tá álopini koma innanífrá.

Málið er, og hevur síðani okkara fyrsta mannaborna málrøkt fór at virka, verið høvuðsamboðið í øllum økjum okkara tjóðskaparstríði, og eingin orsøk er til at máa burturav okkara sterkasta trumfi. Heldur hinvegin. Vit skulu leggja doyðin á at gera alt vit megna at rudda burtur alt, sum kann hugsast at hótta mál okkara.